## Rex villleiddi við Frændum

Rex villleiddi viðskiftafólkini, tá ið klubburin einaferð mitt í summar lýsti í Sosialinum við, at Frændur skuldi spæla í Rex.

Í lýsingini var mynd við teimum trimum frontmonnunum í Frændum.

Men tá ið avtornaði, var tað bara Eyðun Nolsøe við og hann spældi við egnari manning.

Hetta varð kært til Brúkaraumboðið, sum er komið til ta niðurstøðu, at hetta var villleiðandi marknaðarføring og at Rex ikki sýndi góðan marknaðarføringssið.

Brúkaraumboðið sigur, at lýsingin kann hava givið brúkaranum ta fatan, at allir tríggir á myndini fóru at vera við í Frændurmanningini, sum spældi á Rex hetta vikuskifti og at hetta kann eisini hava ávirkað eftirspurningin eftir atgongumerkum.

Við tað at bert ein av persónunum á myndini í lýsingini var á pallinum í Rex, metir Brúkaraumboðið, at brúkarin ikki hevur fingið tað virðið fyri pengarnar, sum hann kundi vænta eftir lýsingini.

Brúkaraumboðið sigur, at umboð fyri REX hava tikið undir við niðurstøðuni hjá Brúkaraumboðnum og at hann tí ikki ger ikki meir við málið.



*Uppskotið um at lækka tingmannatalið fer kanska eisini at bera við sær, at minsta atkvøðutalið fyri at fáa umboð á ting, skal hækkast. Tað er eisini ein møguleiki, at ein partur av sparingunum skulu brúkast til professionellar skrivarar til tingfólk*

# Vil framvegis avtaka átta løgtingslimir

Áki Bertholdsen

Uppskotið, sum Bjørn Kalsø og aðrir tingslimir nú eru á veg í Løgtingið við um at skerja tingmannatalið, verður kanska meiri umfatandi enn upprunaliga ætlað.

Tað staðfestir tingmaðurin fyri Sambandsflokkin fyri Portalinum

Tað var í summar at Bjørn Kalsø fortaldi, at hann ætlar at leggja uppskot fyri Løgtingið um at skerja tingmannatalið úr 33 niður í 25.

Men hóast onki frættist aftur, merkir tað ikki, at ætlanin er slept.

Tvørtur ímóti er líkt til, at uppskotið, sum fer at leggja fyri Løgtingið verður meiri umfatandi enn.

### Kanna møguleikar

Bjørn Kalsø sigur, at hann ætlar at fáa fleiri tinglimir at leggja uppskotið fram fyri at tryggja, at tað fær undirtøku.

Upprunaliga ætlaði hann at leggja eitt einfalt uppskot fram, sum einans hevði til endamáls at skerja tingmannatalið niður í 25.

Men tinglimir, sum umhugsa at leggja uppskotið fram saman við honum, vilja hava aðrar spurningar upp í.

Eitt nú er ynski frammi um at broyta minstamarkið fyri, hvussu nógvar atkvøður ein flokkur skal hava fyri at fáa umboð á ting.

Men ynski er eisini frammi um at ein partur av pengunum, sum verður spardur við at lækka tingmannatalið, skal brúkast til at seta fólk í starv, sum skulu verða skrivarar hjá tinglimunum fyri at styrkja tingarbeiðið.

Bjørn Kalsø sigur, at hann kannar hesar møguleikar.

Hann dugir ikki at siga, hvussu leingi hann ætlar at bíða eftir eini avgerð.

Men hann ætlar undir øllum umstøðum at leggja uppskotið fyri Løgtingið áðrenn síðstu freist einaferð í vár fyri at leggja uppskot fyri Løgtingið í hesi tingsetuni, sum endar á ólavsøku.

Bjørn Kalsø sigur, at orsøkin til at uppskotið verður lagt fyri Løgtingið, er rætt og slætt tí at tey halda, at tað er ov nógv at hava 33 løgtingslimir í einum lítlum landi sum Føroyum.

Men hann hugsar eisini um hetta sum eitt sparitiltak.

– Tað er ónetaliga dýrt at reka hetta samfelagið og samstundis tosa øll um at rationalisera og effektivisera. Og verða tað færri tinglimir, verður tað kanska eisini lættari at avmarka talið á landsstýrisfólkum.

# Virkin sum longst í Nesvík

Í næstu viku verða eldradagar í Nesvík fyri pensjónistar í Vágum, Þorkeri og í Sunda Kommunu Vága.

Tiltakið verður hósdagn 28. oktober og fríggjadagin 29. oktober og tað er ein liður í verkætlanini, "okkara lív sum eldri"

Av tí at tiltakið í ár er í Leguhúsunum í Nesvík, liggur væl fyri at gista har.

Skráin fyri eldradagarnar í Nesvík er sera fjølbroytt. Hósdagin verður byrjað klokkan níggju við morgunsangi og drekkamunni. Síðandi setir Kim Durhuus, borgarstjóri, eldradagarnar og Sveiney Sverrisdóttir, verkætlanarleiðari, kunnar um verkætlanina.

Aftaná fer Helgi Jacobsen at greiða frá um hvalastøðina við Áir, og síðani fáa luttakararnir høvi at síggja støðina, har Edvard Hermansen fer at geiða frá tí virksemi, sum einaferð var á støðini.

Eftir ein matarsteðg koma børn úr dagstovni á vitjan. Turid Jacobsen fer síðani at hava hugleiðingar um hvussu ein fyrireikar seg til pensiónistatilveruna, og síðani fara nøkur fólk at greiða frá hvussu umráðandi tað er at fyrireika seg.

Seinnapartin verður eisini útferð til Saksunar.

Tá ið døgurðin er farin niður um, fer Knud Jacobsen, kommunulækni, orðið, og so er undirhald á skránni.

Fríggjamorgunin vera verkstovur um lívssøgur, ættargransking, føroysk klæðir, myndabók og onnur evni

Seinnapartin fer Óløf Briem frá apoteksverkinum at tosa um heilivág. Somuleiðis fara fólk frá Nærverkinum at greiða frá um ymisk tiltøk, og tað er eisini útferð til Gjáar á skránni.

Eldradagarnir enda við undirhaldi í Eydnuni, við bæði harmoniku- og føroyskum dansi.

Lýst verður, hvussu verður við tilmelding.